# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**

30. november fingu Teresa og Magnus Joensen, Lamba, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4050 gr.

1. desember fingu Randi Lamhauge Hansen og Ólavur Olguson, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

2. desember fingu Gunnleyg og Petur Páll Juul, Eiði, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3900 gr.

2. desember fingu Una og Tórstein á Steig, Sandavágur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3800 gr.

3. desember fingu Annika Joensen og Ólavur Dam Jacobsen, Skopun, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3150 gr.

5. desember fingu Ann Jacobsen og Jón Johansen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3930 gr.

5. desember fingu Finnur og Gitte Klein, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3775 gr.

5. desember fingu Ingibjørg Egholm og Jóanes N. Dalsgaard, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

---

**Brúdleyp**
Leygardagin 9. desember kl. 16 giftast í Saksunar kirkju Vár Solbjerg Lamhauge, Streymnes og Jóhan Jógvansson úr Dúvugørðum, Saksun. Veitsla verður fyri innboðin í Kappróðrarneystinum í Streymnesi.

Leygardagin 9. desember kl 16 giftast í Havnar kirkju Halla Seyer Hansen og Pauli Johannesen. Dagurin verður hildin á Dýrindalsgøtu 10 í Hoyvík, frá kl 19.

Leygardagin 9. des. giftast i Nes kirkju kl. 14 Ann Julin Benjaminsen Nes og Hans Anders Jacobsen Strendur. Borðhald verður fyri innbodnum á Svangaskarði kl. 19.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 5. decembur høvdu hjúnini Marin Elisabeth og Kaj Johannesen Kaldbak silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 16. december í Pálsstovu frá kl 18 har vinir og kenningar eru vælkomin at halda dagin saman við okkum.

Mánadagin 11. desember hava hjúnini Svenhilda og Jofridt Jensen, Fuglafirði, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá Sonna á Bjarnavegi 13 frá kl. 18.

**70 ára føðingardagur**
23. novembur fylti Manne Næs 70 ár. Dagurin verður hildin í Roynhøllini tann 9. desember frá klokkan 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin til »brunch« og hugnaliga samveru.

**80 ára føðingardagur**
Í dag fillur Vinna Eliasen Klaksvík 80 ár. Dagurin verður hildin heima á Stoksoyrabakka 7 í Klaksvík.

**Dagurin**

**9. desember. Rólvur.** Teir vita einki halgimenni at navni Rólvur ella Rudolf. Komið upp í álmanakkan í 1727. Navnið er týskt, sett saman av hrodr, ið merkir heiður og wulf, ið merkir úlvur.

**10. desember. Judit.** Apokrýfiska bókin í Gamla testamenti greiðir frá konubrotinum Judit, sum høgdi høvdið av herhøvdinganum Holofernes. Navnið er bíbilskt og merkir jødakvinna

**11. desember. Damasus,** deyður ár 384. Diakonur hjá pávanum Liberiusi og varð sjálvur valdur til páva eftir hann. Hann er fyrst og fremst kendur sum tann, ið álegði Hieronymusi at týða bíbliuna av nýggjum

# Til minnis um Jákup Augustinussen

Tung vóru boðini eg fekk um at Gaga var farin. Tað var ikki væntað, at tað bleiv so brádliga. Gaga stríddist við herviliga sjúku, og tað gekk tíverri rættiliga skjótt tann skeiva vegin.

Nógv er at minnast afturá, tá man hevur verið vinfólk í eini 30 ár.

Minnist serliga tá hann og Olivina komu saman, tað var ein løgin kensla at møta hesum manni.

Einum manni, sum eg hevði sitið og hugt eftir úr vindeyganum í Funningstovu yvir í móti Gjaldsstovuni. Hevði hugsað, at hasin maðurin arbeiddi bæði nátt og dag. Hann var til arbeiðis, tá eg fór í song, og tann fyrsti eg sá aftur, tá eg vaknaði. Tá var hann aftur til arbeiðis. Hetta sigur bara nakað um, hvussu arbeiðsamur hann altíð hevur verið. Hann livdi fyri sínum arbeiði, so tað má vera ein stórur saknur hjá hansara starvsfeløgum.



Hann fylgdi eisini við í øllum sum hendi í samfelagnum, og hann hevði sum oftast bæði útvarp og sjónvarp frá í einum, meðan hann læs bløðini. Tað var einki sum fór framvið.

Gaga var ein góður vinur at eiga. Um tú bað hann um hjálp, ella spurdi hann til ráðs, so var hann altíð klárur.

Hann var vinarligur og fylgdi væl við, hvussu tað gekk mínum børnum, sum hann eisini var gubbi at, og spurdi altíð hvat tey fingust við.

Gaga dámdi væl at arga, erta. Haldi sjálv, at tað var ein máti, hann vísti, tá hann var góður við ein.

Eg var og vitjaði hann á sjúkrahúsinum. Sótu tveyeini, fingu eitt gott prát, og hann tosaði um, hvussu takksamur hann var fyri allan tann stuðul Olivina og børnini vóru fyri hann, vóru hjá honum úti á Landssjúkrahúsinum til langt út á kvøldið.

Børnini stóðu honum nær. Hann hevur stuðlað tær væl í einum og øllum, og var glaður nú Rakul fór í læru í Føroya Sparikassa, og tá Randi byraði í summar á Føroya Studentaskúla. Ja, hann hugsaði nógv um, at lærdómur er lykil til mangt, og at lærdómur ikki er tungur at bera.

At skriva nøkur orð um Gaga, kunnu ikki gerast uttan at nevna ítrótt, fótbólt og hondbólt, sum hann brúkti hvørt vikskifti uppá. Um summrarnar niðri í Gundadali og vetrarnar í høllini í Hoyvík ella á Hálsi.

Gaga var ein familjumaður burturav. Hann gekk høgt uppí sína familju og ikki minst sína verfamilju, sum tað eisini verður ein stórur saknu hjá.

Góða Olivina, Rakul og Randi! Hjá tykkum er saknurin størstur. Má Gud styrkja tykkum í stóru sorg tykkara, nú tit hava mist ein góðan mann og pápa

Við hesum fáu orðunum vil eg lýsa frið yvir vin mín Jákup Augustinussen

**Helga**

# Gullbrúdleyp

Mánadagin 11. desember hava hjúnini Svenhilda og Jofridt Jensen í Fuglafirði gullbrúdleyp.

Tey eru bæði ættað úr Fuglafirði. Jofridt er sonur Thomas Jensen, vanliga nevndur Tummas í Toftum og Sofíu (vanliga nevnd Fía). Jofridt er triðyngstur av sjey systkjum.

Svenhilda er dóttir Alexandur og Súsannu (vanliga nevnd Duda) Kristiansen, og hon er yngst av sjey systkjum.

Eftir at Jofridt var liðugur við skúlan, fór hann í læru sum skipstimbrari á Bedingini í Fuglafirði. Hann smíðaði eisini eina tíð saman við Petur Jacob Johannesen. Í 1953 fór hann, eins og nógvir aðrir føroyingar, til Føringahavnina í Grønlandi at arbeiða. Hann var har í 10 summur. Í 1963 byrjaði hann sum formaður á Handils & Frystivirkinum í Fuglafirði, og har starvaðist hann heilt til 1995. Hesi síðstu árini hevur Jofridt gjørt ymiskt arbeiði, og hann er altíð til reiðar at



fara oman í egningarskúrin, tá ið brúk er fyri egnarum.

Svenhilda arbeiddi sum ung í Piddasa handli, hon var á húsarhaldsskúla í Danmark, og hon var eisini í húsplássi í Sandavági. Síðani tey giftust, hevur Svenhilda ikki arbeitt úti, men tikið sær av heiminum.

Jofridt og Svenhilda fingu fýra synir og eina dóttir, Alis, ið doyði sum nýføðingur. Synirnir eru Sonni, Agnar, Sólbjørn og Frants. Agnar býr í Havn, meðan hinir búgva í Fuglafirði.

Nógv fólk hava gjøgnum tíðina vitjað og gist í heiminum hjá Svenhildu og Jofridt. Ommu- og abbabørnini hava eisini kent tann stóra kærleikan og blíðskapin frá teimum. Svenhilda og Jofridt dáma eisini væl, at familja og vinir støkka inn á gólvið, og øll eru altíð vælkomin.

Í frítíðini hava tey verið virkin í missiónshúsinum Thabor. Jofridt hevur eitt nú havt sunnudagskúla í yvir 50 ár. Hann hevur eisini verið klokkari, síðani hann var ungur, fyrst sum avloysari og nú í nógv ár hevur hann verið fastur í hesi tænastuni. Umframt hetta, so er tað seyður og jarðarbrúk, sum hann nýtir tíðina til og honum dámar eisini sera væl at fara á flot.

Gullbrúðarparinum verður ynskt hjartaliga til lukku við degnum.